**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Kravtíðir til NJM, NM og HMS 2016

Starvsnevnd SSF hevur ásett fylgjandi kravtíðir til Norðurlendsku JuniorMeistarstevnuna og Meistarastevnuna í Kolding í Danmark hin 9. til 11. desember 2016, umframt til HeimsMeistarastevnuna á Stuttgeil í Windsor í Kanada hin 6. til 11. desember 2016.

Kravtíðirnar eru funnar við at rokna meðaltíð fyri veikastu heiðursmerkjatíð í viðkomandi grein á seinastu trimum EvropaMeistarastevnum á Stuttgeil, og so leggja ein prosent-sats afturat. Veikasta heiðursmerki er vanliga bronsa, men kann vera silvur ella gull.

Prosent-satsirnir eru í ár settir at vera +20% til yngru juniorar, +16% til eldru, +12% til NM-svimjarar, og +6% til HMS-svimjarar.

Starvsnevndin tilskilar sær hartil rætt at meta um venjingarstøðið hjá viðkomandi svimjarum, út í frá úrslitum svomin síðani 1. september 2016.

Kravtíðirnar skulu vera kláraðar í hesum tíðarskeiðum, í 25 metra hyli.

- NJM/NM 2016: Frá og við 11. desember 2015, til og við 20. november 2015
- HMS 2016: Frá og við 2. desember 2015, til og við 20. november 2015

Árgangirnir eru sum tilskilaðir í yvirlitunum; gentur føddar 2000-2003 og dreingir føddir 1999-2002 til NJM, og gentur føddar 1999 og fyrr og dreingir føddir 1998 og fyrr til NM.

Til HMS kann hugsast at SSF úttekur eyka svimjarar, soleiðis at tey eru íalt tríggir (3) svimjarar, og í øllum førum ein (1) av hvørjum kyni, um færri enn trý (3) klára kravtíð. Juniorar kunnu væl koma upp á tal, serliga um færri enn tríggir (3) seniorsvimjarar klára kravtíð.

Sí annars “Reglugerð um úttøku og kravtíðir”:
http://www.ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Feløgini verða biðin um at fráboða Svimjisambandinum um teir svimjarar ið hava klárað kravtíðirnar, við tilskilan av grein og tíð, umframt nær og hvar tíðin varð svomin.

Svimjisambandið tekur út landsliðini í vikuni eftir úttøkustevnuna 18. - 20. november 2015.

Vegna Svimjisamband Føroya

Rókur í Jákupsstovu

ATLANTIC AIRWAYS

**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Swimming Association
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Norrøna Svimjisambandið (NSF)
Ligue Européenne de Natation (LEN)
Fédération Internationale de Natation (FINA)

# Kravtíðir til NJM, NM og HMS 2016

## Kvinnur

| Grein | NJM (02-03) | NJM (00-01) | NM (-99) | HMS |
|---|---|---|---|---|
| 50 frí | - | - | 00:26.92 | 00:25.48 |
| 100 frí | 01:03.04 | 01:00.93 | 00:58.83 | 00:55.68 |
| 200 frí | 02:16.25 | 02:11.71 | 02:07.17 | 02:00.36 |
| 400 frí | 04:47.09 | 04:37.52 | 04:27.95 | 04:13.59 |
| 800 frí | 09:55.63 | 09:35.78 | 09:15.92 | 08:46.14 |
| 1500 frí | - | - | - | - |
| 50 rygg | - | - | 00:29.90 | 00:28.30 |
| 100 rygg | 01:08.98 | 01:06.68 | 01:04.38 | 01:00.93 |
| 200 rygg | 02:28.31 | 02:23.36 | 02:18.42 | 02:11.01 |
| 50 bringa | - | - | 00:33.64 | 00:31.84 |
| 100 bringa | 01:18.21 | 01:15.60 | 01:13.00 | 01:09.09 |
| 200 bringa | 02:48.22 | 02:42.61 | 02:37.01 | 02:28.59 |
| 50 firvald | - | - | 00:28.49 | 00:26.96 |
| 100 firvald | 01:07.99 | 01:05.73 | 01:03.46 | 01:00.06 |
| 200 firvald | 02:30.20 | 02:25.20 | 02:20.19 | 02:12.68 |
| 100 blandað | - | - | 01:06.07 | 01:02.53 |
| 200 blandað | 02:32.59 | 02:27.51 | 02:22.42 | 02:14.79 |
| 400 blandað | 05:19.32 | 05:08.67 | 04:58.03 | 04:42.06 |

## Menn

| Menn | NJM (01-02) | NJM (99-00) | NM (-98) | HMS |
|---|---|---|---|---|
| 50 frí | - | - | 00:23.65 | 00:22.38 |
| 100 frí | 00:56.06 | 00:54.20 | 00:52.33 | 00:49.52 |
| 200 frí | 02:04.04 | 01:59.91 | 01:55.77 | 01:49.57 |
| 400 frí | 04:24.18 | 04:15.37 | 04:06.57 | 03:53.36 |
| 800 frí | - | - | - | - |
| 1500 frí | 17.28.80 | 16:53.84 | 16.18.88 | 15:26.44 |
| 50 rygg | - | - | 00:26.14 | 00:24.74 |
| 100 rygg | 01:00.86 | 00:58.83 | 00:56.80 | 00:53.76 |
| 200 rygg | 02:13.58 | 02:09.13 | 02:04.68 | 01:58.00 |
| 50 bringa | - | - | 00:29.55 | 00:27.97 |
| 100 bringa | 01:08.81 | 01:06.51 | 01:04.22 | 01:01.78 |
| 200 bringa | 02:27.84 | 02:22.91 | 02:17.98 | 02:10.59 |
| 50 firvald | - | - | 00:25.33 | 00:23.98 |
| 100 firvald | 01:00.47 | 00:58.45 | 00:56.44 | 00:53.41 |
| 200 firvald | 02:15.19 | 02:10.69 | 02:06.18 | 01:59.42 |
| 100 blandað | - | - | 00:59.14 | 00:55.97 |
| 200 blandað | 02:17.39 | 02:12.81 | 02:08.23 | 02:01.36 |
| 400 blandað | 04:53.37 | 04:43.59 | 04:33.81 | 04:19.14 |

ATLANTIC AIRWAYS